# HEILSANIR



**Góða omma**
Hjartaliga tillukku við føðingardegnum 4. sept. Takk fyri alt tú er fyri okkum.
**Bestu heilsanir Bergur**



**Góða omma**
Hjartaliga tillukku við 75 ára degnum 6. sept. Takk fyri at tú altíð er so góð við okkum.
**Heilsan Bárður og Durita**



**Góða elskaða Leyvoy**
Hjartaliga tillukku við 4 ára degnum. Jesus pápi signi teg. Vit sakna tykkum.
**Bestu heilsanir Julianna og Regin**



**Hey Sunniva**
Tillukku við 15 ára degnum, sum er í dag.
**Heilsan Gita hvør?**



**Góði Vár og Lív**
Hjartaliga tillukku við føðingardøgunum 7. sept. Eisini ein heilsa til ommu við føðingardegnum 8. sept.
**Heilsan mamma, babba, Trygvi og Jørgin**



**Til tvíburðarnar Meinhard og Sámal Hentze Johannesen**
Góðu tit báðir. Hjartaliga tillukku við 2 ára døgunum. Alt tað besta.
**Heilsan omman og abbin í Bóndabrekku**



**Góði Jógvan Andrias**
Hjartaliga tillukku við 3 ára føðingardegnum 6. sept.
**Langomma á Bakkanum**



**Góði fitti gubbi**
Hjartaliga tillukku við 20 ára degnum 7. sept. Takk fyri at tú er so góður við meg.Ynskja øll í húsinum.
**Kristina**



**Góði elskaði babba**
Eg og mamma ynskja tær hjartaliga tillukku við føðingardegnum í morgin. Vit elska teg.
**Hallur**



**Góðu Meinard og Sámal**
Hjartaliga tillukku á 2 ára døgunum 17. sept. Eisini ein heilsan til ommu á Oyri, sum fyllir saman dag.
**Heilsan mamma, babba, Helena og Jákup Andrias**



**Allarbesti Sveinur**
Hjartaliga tillukku við 9 ára degnum 5. sept.



**Góði Mads**
Hjartaliga tillukku við 7 ára degnum, sum var 31. aug. Alt tað besta.
**Heilsan Lita**



**Góði Sámal Jákup**
Hjartaliga tillukku við 1 ára føðingardegnum í dag. Tú ert tann fittasti beiggin í verðini. Eisini tillukku til tín mamma og Maiken fastir.
**Heilsan Edna**



**Nú hon sjálv....**
Fortel nú hvat tú minnist um flóð og fjørðu. Ikki er altíð so lætt at minnast!
**Heilsan hini bæði í køkinum**



**Góði Ronni**
Hjartaliga tillukku á 26 ára føðingardegnum. Eg elski teg.
**Tín Lillian**



**Góðu Durita, Birita og Heðin**
Mamma og babba ynskja tykkum tillukku við døgunum tann 7. sept. og 16. sept. Jesus pápi signi tykkum.
**Heilsan mamma og babba**



**Góði Kristian**
Hjartalita tillukku við 5 ára degnum 8. sept. Vit elska teg.
**Heilsan mamma og babba**



**Góða fitta gumma**
Hjartalig tillukku við degnum í dag. Øll góð ynskir í framtíðini, ynskja vit øll
**Kristina**



# TILTØK

**Gudstænastur**
**12. sunnud. e. trinitatis**
*Vesturkirkjan:* kl. 11 altarg., Heri Joensen. Talvan gongur fyri Bróðurringin á Havinum
*Havnar kirkja:* kl. 11 Hans J. Joensen, biskupur og Bjarni Bæk, dómpróstur, prestavígsla Patrick de Neergaard verður vígdur
*Hestur:* kl. 12 altarg., Bergur D. Joensen
*Funningur:* kl. 11 messa,
*Gjógv:* kl. 12.30 messa, Emil Olsen
*Gásadalur:* kl. 11 altarg. David Johannesen
*Hvannasund:* kl. 12 altarg., Elsa Funding
*Vestmanna:* kl. 11, altarg.,Inga Poulsen Dam
*Gøta:* kl. 11 altarg., Martin R. Jacobsen
*Oyndarfjørður:* kl. 12, altarg.,
*Oyndarfjørður:* kl. 16, Jógvan Fríðriksson
*Glyvrar:* kl. 11, altarg., Meinhard Bjartalíð
*Dalur:* kl. 12, altarg., Jákup R. Hansen

**Ebenezer**
Sunnudagin kl. 10 Breyðbróting, kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møti, kl. 21 Útimøti.
Mikudagin kl. 17.30 AWANA.
Mikukvøldið kl. 20 Bønar- og uppbyggingarmøti.

**Hebron, Argir**
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti, barnaansing er samstundis, kl. 12.15 er sunnudagsskúli.
Mánadagin kl. 19.00 Ungdómstiltak, sum verður annanhvønn mánadag og er ætlað ungdómi (5.-10.flokk).

**Meinigheitin í Hoyvík**
*upp á Brekku 3*
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Jónhild og Samuel úr Ghana.
Mánakvøldið kl. 20.30 Bønarmøti.

**Samkoman Rhema**
*Staravegur 5*
Fríggjakvøldið kl. 20 byrjar JC-Teens – fyri ungfólk til og við 18 ár.
Sunnudagin kl. 11 Familjumøti. Øll eru vælkomin.
www.rhema.fo

**Lívdin**
*í Hoyvíkar skúla*
Sunnumorgunin á familjumøtinum kl. 10.30 talar Billy Hansen um evnið: Hví doyði Jesus? og á tilbiðjunarmøtinum kl. 12 talar Jógvan Zachariasen um evnið: Tey fimm endamálini – læran. Barnaansing er fyri børn undir skúlaaldri á báðum møtunuim. Sunnudagsskúlin er kl. 12. Drekkamunnur er millum bæði møtini.
***Úti á Fløtum***
Mánakvøldið kl. 20 Alfa-Beta skeiðið og týskvøldið kl. 20 samlast húsbólkarnir.
Heimasíðan: www.livdin.fo

**Meinigheitshúsið**
Leygardagin kl. 16.30 Bønarløta fyri kvinnur, kl. 19.30-22 Juniorhugni, kl. 20 Møti – Bróðurringurin á havinum – við Agnar Nielsen
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti – Bróðurringurin á havinum – við Jógvan Fríðriksson.

**Katólska kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Orðsinstænasta við kommunión í Kerit.
Hóskvøldið 4. september kl. 20 verður fyrsta Taizé-kvøld aftur í Kerit. Taize-kvøld (bønarstund við sálmasangi úr Taizé) í bønarrúminum hjá Franciskanasystrunum, Varðagøta 16. Øll eru vælkomin.
Leygardag kl. 11.30 Orðsinstænasta við kommunión í Kerit.
Sunnudag kl. 11 Orðsinstænasta við kommunión í Mariukirkjuni.

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í dag kl. 17 Landsbøn.
Í morgin kl. 11 Morgunmøti v/ Tummas Jacobsen kl. 11.30 Barnagudstænasta, kl. 18 Evangel. møti v/ Preben Hansen og Jenis av Rana (møguleiki er fyri forbøn, fyri tey ið ynskja tað).
Mánakvøldið kl. 20 Bønarskúlin.
www.filadelfia.fo

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Sunnudagin kl. 11 og 18 Møti, major Kai Clausen talar. Sunnudagsskúli kl. 14 og bøn kl. 17.30.
Mánadagin kl. 17 og 19 Skótamøti.

**KFUM og KFUK í Havn**
Sunnudagin kl. 16 í KFUK: KFUK fundur fyri limir, broytt klokkutíð.
Mánadagin kl. 15 í KFUK: Eldrasamkoman við Petur Skeel Jacobsen.

**Samkoman Immanuel**
Sunnudagin kl. 13 Sunnudagsskúli, kl. 17 Møti.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti og kl. 18 Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Kirkju- og missiónshúsið á Argjum**
Sunnukvøldið Møti v/ Petur Steingrund, Tórshavn.

**Glæman, Kvívík**
Sunnudagin kl. 16 Møti við John Myllhamar, trúboðara. Innsavning.

**Vestmanna missiónshús**
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli kl. 19 Møti við Hjallgrim Davidsen, Jónhildu og Gulaki Hansen.

**Saron, Vestmanna**
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti v/ breyðbróting.
Mánadagin kl. 20 Bønarmøti.
Telefonandaktin 424741.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21 Opið hús við Leif Høj.
Sunnudagin kl. 17 Møti við Anniku Høj. Barnamøti kl. 17. Vælkomin í Kelduna.
www.keldan.fo

**Nebo, Toftir**
Hildið verður fram við summarskránni sunnudagar.
Familjumøti við sunnudagsskúla verður kl. 11.30.
Sunnukvøldið verður einki møti.

**Eftirkomarar úr Mirmansstovu, Eiði**
Í samband við føroyavitjanina hjá Wendy Allen, úr New Zealandi, abbadóttur Poul í Mirmansstovu, verður hugnaløta fyri eftirkomarar úr Mirmansstovu í skúlanum á Eiði leygardagin kl. 17.

**Thabor, Toftir**
Ungdómsmøti verður í kvøld kl. 21. Eingin sunnudagsskúli verður sunnudagin. Ístaðin verður familjumøti kl. 18, har myndir verða vístar frá føroyska arbeiðinum millum gøtubørn í Kiev í Ukreina. Mareta Klein, ið hevur verið volontørur í Ukreina, verður við. Nátturði verður aftaná. Savnað verður eisini inn til Thabor.

**Lívsins Orð**
Evangel. møti verður sunnudagin kl. 17 við Palla Højgaard.
Ungdómsmøti verður mánakvøldið kl. 20. Øll eru vælkomin.

**Meinigheitshúsið á Skála**
Sunnudagin kl. 13.30 Sunnudagsskúli og kl. 19 Møti við Petur F. Johannesen. Barnaansing er undir møtinum. Aftaná verður drekkamuður. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Betania, Skopun**
Sunnudagin kl. 18 Sjonvarpsmøti. Vælkomin í Betania.

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn og lovsangur, kl. 18 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Mánadagin kl. 17 Barnaarbeiði 1.-5. fl.
Týsdagin kl. 19 Ungdómurin 6. fl. og eldri. Hjartaliga vælkomin.

**Aglow, Sandoy**
Aglow møti verður í Samljóð, leygardagin kl. 20 við vitjan av Lív og systrunum. Allar kvinnur eru vælkomnar.

**Missiónshúsið í Skálavík**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti, Regin Høgnesen talar. Essa Jacobsen úr Leirvík syngur.

**Soli Deo Gloria**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Kaj M. Michaelsen.
Mánakvøldið kl. 20 Meinigheitsfundur.

**Getsemane**
*á Brekku 19, Klaksvík*
Sunnumorgunin er morgunmøti kl. 11 (barnaansing er undir møtinum). Tú ert hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við Ragnar Ludvig og Katrinu Bærendsen. Bønarmøti verður hálvan tíma áðrenn møti. Innsavnan verður til húsið. Øll eru hjartaliga vælkomin. Sjómanskvinnuringurin kemur saman týskvøldið. Allar kvinnur eru vælkomnar.

**Missiónshúsið í Hvalba**
Allir sjómanskvinnuringarnir í oynni samlast í missiónshúsinumí Hvalba leygardagin 27. sept. kl. 18.00. Sjómanstrúboðarin verður við. Allar kvinnur eru vælkomnar.

**Missiónshúsið í Vági**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við Terja Nielsen og Mourits Viderø, Mourits syngur. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Sion, Vágur**
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Mánakvøldið kl. 21 Bønarmøti og Bønartænasta á tlf. 373777. Tú ert vælkomin at ringja, um tær tørvar forbøn.

**Betel, Vágur**
Leygardagin kl. 20 Ungdómsfundur við luttøku av ungdómi úr Havn.
Sunnudagin kl. 11 Breyðbróting, kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. fundur, kl. 21 Útifundur um viðrar.
Ónsdagin kl. 20 Bønar- og Uppbyggingarfundur.

**Betania, Sumba**
Sunnukvøldið kl. 20 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Tilhaldið Hugnin í Sandoynni**
Tilhaldið í Sandoynni er opið mánadag og mikudag frá kl. 14-17. Kaffi er at fáa báðar dagarnar.
Skrá:
*Mánadagin 8. sept.*
Vit fara til Havnar at vitja. Farið verður við bussi úr Tilhaldinum uml. kl. 10 og av Skopun kl. 10.30. Vit eta døgurða uml. kl. 11.30. Síðani verður farið at bowla kl. 13 og kl. 15 fara vit í Tilhaldið í Havn at vitja. Kostnaður fyri túrin er 200 kr og neyðugt er at melda til.
*Mikudagin 10. sept.*
Sólrun Christiansen lesur 1. part av framhaldsøgu. Framhald av hesari søgu, verður lisið komandi mikudagar.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
*Mánadagin 8. september*
kl. 10 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10-18 Myndaveving á loftinum.
kl. 10-10.30 Seyma fýrkantar saman í kjallaranum
kl. 14-18 Kortspæl, landastrok, bobbspæl, telving, dart og onnur spøl
kl. 15 Fáa vitjan úr Sandoynni
*Týsdagin 9. september*
kl. 10-12 Vit baka
kl. 10-11.30 Vit syngja, Eyðun Sørensen. Øll eru hjartaliga vælkomin
kl. 14.30 Havnaprát
*Mikudagin 10. september*
kl. 9.30 Túrur til Nólsoyar, farið verður kl. 9.30 við Rituni og heim aftur kl. 16.30. Vitja verður á bygdasavninum, døgurði og síðani verður vitja í Korndali, har Richard Jacobsen sigur frá.
**Tilhaldið stongt í dag. Tilml. 316491, gjaldast áðrenn 150,-**
*Hósdagin 11. september*
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-17 Telduprát, Brandur Petersen
*Fríggjadagin 12. september*
kl. 10-17 Opið hús

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

## BRÚDLEYP

Í dag, 6. september kl. 14.30 giftast í Skála kirkju Kristina Viderø Olsen, Skáli og Nikl ái Nysted, Hvannasund.

Leygardagin 27. september kl. 14.00 giftast í Bahá'í miðstøðini í Tórshavn, Sóley Philbrow, Toftir og Alex de Albuquerque Troleis, Brasilien. Veitslan verður á Svangaskarði kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið á hjúnabandsdegnum, biðjast vinarliga siga frá á tlf. 224594 ella 444233 áðrenn 9. september.

## SILVURBRÚDLEYP

Týsdagin 30. september hava Maiken og Mikkjal Lervig, Leirvík, verið gift í 25 ár. Dagurin verður hildin í Bygdarhúsinum í Leirvík 4.10.03. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma, verða biðin at siga frá á tlf. 443223 ella 222709 áðrenn 28. september.

Týsdagin 7. oktober hava hjúnini Jastrid og Johan Sigurd Weihe, Runavík, verið gift í 25 ár. Dagurin verður hildin leygardagin 11. okt. kl. 19.00 í bygdarhúsinum í Leirvík. Tey, ið vilja gleða silvurbrúðarparið við at koma, verða biðin um at siga frá á tlf. 448020 ella 218010 áðrenn 4. okt.

## EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

*Jesus segði: »Vórðu ikki teir tíggju reinsaðir? Hvar eru teir níggju? Var annars eingin, sum vendi aftur at geva Guði heiðurin uttan hesin fremmandi?«*
***Lukas 17,17 og 18***

Bert ein av teimum tíggju spitalsku, sum Jesus lekti, vendi aftur at geva Guði heiðurin. Hvímundi so vera? Teksturin (Luk. 17,11-19) um teir tíggju spitalsku menninar gevur okkum einki svar, men ein indiskur prædikumaður roynir at svara hesum spurningi í einari bók, sum hann kallar: Í dag, mín Jesus.

Her eru sjey svar:

1) Eg gloymdi tað í allari gleðini um at síggja míni kæru aftur, og tá ið tað endiliga kom mær til hugs, var Jesus farin víðari.

2) Eg kundi tá ikki takka saman við einum sámáriubúgva, so satt sum eg eri ein trúgvandi ísraelsmaður.

3) Eg vildi ikki koma tómhentur, men eg dugdi ikki at finna eina hóskandi gávu.

4) Eg visti ikki, um heilsan, sum mær varð givin aftur, vildi vara, men nú, tað er vorðið mær greitt, er Jesus ikki her longur.

5) Tað kom mær til hugs, at hann ikki væntaði sær tøkk fyri alt tað góða, sum hann gjørdi móti øllum. Tí lat eg vera við tí.

6) Tað var avgjørt mítt vakra lív ella lívsførsla, sum gjørdi, at Jesus grøddi júst meg.

7) Eg vildi eisini siga honum tøkk, men tey flestu lótu vera og eg vildi ikki vera øðrvísi enn hini.

Spurningurin er so, um vit eru teirra millum, sum eru ótakksom koma við undanførslum, ella teirra millum, sum ikki gloyma at takka, men siga við sálmaskaldinum í Gamla Testamenti: »Sál mín, Harranum lova, og gloym ikki allar vælgerðir hans«.

**Emil Olsen, prestur**